**Semja millum Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna**

**og**

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

1. Sáttmálaskeið

Sáttmálin verður við fylgjandi broytingum endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. januar 2023 til 31. desember 2025.

2. Lønarhækkingar
   - Tann 1. januar 2023 hækka mánaðarlønirnar 3,8 %.
   - Tann 1. januar 2024 hækka mánaðarlønirnar 4,0%.
   - Tann 1. januar 2025 hækka mánaðarlønirnar 4,75%

   - Lønarstig 3 verður tikið úr lønargongdini hjá handverkarum tann 1. januar 2024. Handverkarar sum standa á hesum stigi tann 1. januar 2024 verða fluttir á nærmasta hægri stig, og standa á hesum stiginum í eitt ár, áðrenn teir flyta á næsta stig í lønargongdini.

   - Lønarstig 5 verður tikið úr lønargongdini hjá handverkarum og montørum tann 1. januar 2025. Handverkarar og montørar, sum standa á hesum stigunum tann 1. januar 2025 verða fluttir á nærmasta hægri stig, og standa á hesum stiginum í eitt ár, áðrenn teir flyta á næsta stig í lønargongdini.

   - Tann 1. januar 2024 verða leiðandi handverkarar fluttir av stig 16 og á stig 18.

   - Nýggj flokking galdandi frá 1. januar 2024:
     Leiðandi handverkari 2 (formaður) ganga stigini 19, 20 og 21.

     Viðm. einstaki arbeiðsgevarin avgerð í samráð við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, hvørt talan er um leiðandi handverkara ella leiðandi handverkara 2.

     Tá ið metingin verður gjørd verður dentur lagdur á ábyrgdarøkið, vavið og slagið av arbeiðsleiðslu.

*Broytingar í sáttmálatekstinum*

3. § 1, stk. 5 verður soljóðandi: "Tá ið starv er leyst, verður tað alment lýst leyst at søkja. Um starvstíðin er styttri enn 6 mánaðir, tá er ikki neyðugt at starvið verður lýst leyst alment."

4. Ásetingar um lærlingar. Galdandi frá 1. januar 2024.
   § 3, stk. 7 Lærlingar verða 1., 2., 3. og 4. læruárið løntir við ávikavist 40, 50, 60 og 70 % av byrjanarlønini fyri útlærd. Er lærutíðin styttri enn 4 ár, verða seinastu lønarstigini nýtt, soleiðis at seinasta heila læruár verður lønt eftir 4. lønarstigi (70 %). Er lærutíðin longri enn 4 ár, verður lønin eftir 4. læruár 80 % av lønini fyri útlærd.

§ 3, *stk. 8.* Tá ið lærlingurin fer í skúla um dagin, verður givið honum frítt at fara í arbeiðstíðini, uttan at tíðin verður frádrigin í løn hansara. Verður skúlagongdin uttanfyri vanligu arbeiðstíðina, skal hetta gevast aftur í vanligum tímatali. Fer skúlagongdin fram frídagar ella leygardagar, skal lærlingurin hava samsvarandi frítíð onkran av yrkadøgunum.

*§ 3, stk. 9* Hava lærlingar undantaksvís yvirarbeiði, fáa teir yvirtíðarløn á 1. stigi í lønarflokkinum, teir koma í, tá ið teir eru útlærdir.

5. § 3. Løn. Setningurin um serstaka lønartalvu fyri montørar og leiðandi montørar hjá SEV verður strikaður.

6. Nýtt § 6, stk. 7:
   Tá yvirtíðararbeiði endar og tað eru færri enn 6 tímar til byrjað verður aftur at arbeiða, verður ikki farið niður í løn.
   Galdandi frá 1. februar 2024.

7. § 19. Stk. 5 verður broytt soleiðis:
   Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín. Hesar 10 vikurnar við løn kunnu liggja innan alt farloyvistíðarskeiðið tó eftir viku 14.

   Hendan ásetingin fær gildi fyri børn fødd eftir 1. oktober 2024.

8. Í § 20 verður lagt afturat, "Eftirsitiløn verður eisini goldin til samlivandi."
   Galdandi frá 1. januar 2024.

9. § 25. Serstøk eykagjøld á SEV
   Stk. 1. Fyri at arbeiða úti á spennum yvir firðir og sund verður veitt viðkomandi eitt eykagjald uppá kr. 200,- fyri hvønn dag, arbeitt verður úti á spenninum. Frá 1. januar 2024 hækkar eykagjaldið til kr. 395,-

   Stk. 2. Fyri at arbeiða uppi í 60 kV mastrum verður veitt eitt eykagjald uppá kr. 10,- um tíman. Gjaldið verður uppgjørt soleiðis, at hóast arbeitt verður gjøgnum dagin partvís í mastrum og partvís á jørðini, verður gjaldið galdandi fyri allar tímarnar, arbeitt verður hvønn dagin sær. Eykagjaldið er bert galdandi fyri tey, ið luttaka í arbeiði uppi í mastrunum, t.v.s. ikki hjálparfólk niðri á jørðini, sum luttaka í sama arbeiði. 1. januar 2024 hækkar eykagjaldið til kr. 30,-

   Hesi gjøld verða roknað fyri byrjaðar hálvar tímar.

   Viðm. gjøldini verða sett í lønartalvuna, og javnaði sum vanliga lønin. Fyrstu ferð 1. januar 2025.

10. § 7 b. Stk. 1 Tilkallivakt verður soljóðandi:
    "Fyri tilkallivakt verður latið vaktargjald 1 um tíman. Fyri vikuskiftistilkallivakt verður latið vaktargjald 2 um tíman. Gjaldið fyri tilkallivakt verður goldið frá tí, at tilkallivaktin tekur við til hon endar. "

11. Dagføring

Lønartalvur og sáttmáli verða dagførd samsvarandi omanfyristandandi.

*Í Tórshavn tann 22 desember 2023*

**Føroya Handverkarafelag**

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

**Landsfelag Handverkaranna**